# num fáa ikki viðhald



reldur teirra vórðu eitrað undir krígnum
(Mynd: AP)



*Nguyen Xuan Minh er eitt av offrunum frá teimum evnafrøðiligu vápnunum, sum amerikanararnir brúktu undir Vietnam-krígnum*
*(Mynd : AP)*



*Amerikonsk flogfør spræna „Agent Orange" oman yvir frumskógin í Vietnam. Myndin er frá 1966*
*(Mynd: AP)*

## Fakta

### Agent Orange

Heitið „Agent Orange" umfatar fleiri sløg av plantudrepandi evnum, sum amerikanarar sprændu oman yvir frumskógin í Vietnam undir krígnum har. Sjálvt heitið stavar frá tunnunum, sum evnið var í, og sum høvdu appelsinlittar strípur. Upprunaliga vórðu evnini ment í 1940-árunum, og tey virka væl ímóti fleiri plantusløgum. Men fleiri kanningar hava avdúkað, at samband er ímillum tey plantudrepandi evnini og ymsar sjúkur so sum krabbamein og sukursjúku. Tað er eisini orsøkin til, at tað er bannað at brúka evnini í nógvum londum, teirra millum USA.

Dow Chemical, við Reuters. Hann leggur afturat, at Dow Chemical hevur alla tíðina verið av teirri áskoðan, at tað eru teir politisku myndugleikarnir í USA og Vietnam, ið eiga at viðgera og loysa møgulig ivamál í sambandi við Vietnam-kríggið.

Tey, sum halda seg hava verið og vera offur fyri „Agent Orange", hava ikki stevnt nøkrum amerikonskum myndugleika.

**Fingið viðhald fyrr**

Spurningurin um „Agent Orange" og avleiðingarnar av tí hevur verið í amerikanska rættarverkinum fyrr. Í 1984 fingu nakrir fyrrverandi amerikanskir Vietnam-hermenn 180 milliónir dollarar í endurgjaldi fyri skaða, sum teir søgdu seg hava fingið av tí plantudrepandi evninum.

Fyri tveimum árum síðani gjørdi ein dómstólur í Suðurkorea av, at Dow Chemical og ein onnur verksmiðja, Monsanto, skuldu gjalda umleið 6.800 einstaklingum 62 milliónir dollarar í endurgjaldi.

Í niðurstøðuni vísti suðurkoreanski rætturin á, at amerikanska vísindaakademiið hevði funnið samband ímillum „Agent Orange" og ellivu sjúkur, teirra millum fleiri sløg av krabbameini.

*(Keldur: Reuters/Aftenposten)*